## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag :**
Fleyr til gul av ymsum ættum, um kvøldið upp í stívt andøvsgul av útsynningi. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið snarar hann í útsynning og ælingur. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Hann minkar vindin niður í lot av vestri ella av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Skrið ella stormur av landsynningi og suðri, týsdagin snarar hann í vestan og útnyrðing við somu vindmegi. Regn ella ælingur og hitin millum 9 og 13 stig.

# Hanus spælir í Vági

**Vísusangarin Hanus G. Johansen fer fyri fyrstu ferð í langa tíð at spæla í Suðuroy, tá ið hann hevur konsert har tann 17. september. Hanus hevur ikki havt nógvar framførslur higartil í ár, men nú verður møguleiki at hoyra hann syngja í Vági**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Hanus G. Johansen er framúr vísusangari og lagasmiðjur, og nógvir av hansara sangum eru vorðnir fólkaogn. Um eina góða viku ber til at hoyra Hanus syngja sínar sangir í Vági*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Leygarkvøldið 17. september fer Hanus G. Johansen at spæla í Stóra Pakkhúsi í Vági, og hetta verður fyrstu ferð í nógv ár, at Hanus spælir í Suðuroynni.

Hanus er helst besti vísusangarin, sum føroyingar eiga, og hann hevur síðani hann var unglingi spælt og sungið fyri fólki.

Fyrstu árini var tað meira á gøtunum í Klaksvík at hann spældi, og har mátti hann við hvørt taka gittaran á nakkan og flýggja undan løgregluni, sum helt, at hann órógvaði friðin, men seinnu árini hevur hann bæði spælt til fínastu mentanartiltøk, til størri og smærri konsertir og festivalar.

Hanus G. Johansen dugir at fáa eina og hvørja áhoyrarafjøld at lurta eftir sær. Hann kann taka eina ørgrynnu av ymiskum sangum, og hann finnur altíð fram til kjarnina í einum tiltaki, so hann kann leggja nakað afturat tí – undirhalda og bergtaka.

### Meistaraligur tulkari

Hanus G. Johansen er kanska best kendur sum ein framúr tulkari av yrkingunum hjá Poul F. Joensen, og eftir at plátan »Gaman og álvara« kom út í 1988, gjørdist Hanus av álvara fólkaogn hjá føroyingum.

Plátan er næstan ikki til at fáa hendur á longur, tí øll vildu eiga sangirnar hjá Hanus og Pól F, og hesir sangir verða nógv sungir til veitslur og onnur tiltøk.

Men einki er, sum tá ið Hanus sjálvur syngur hesar sangir, og hann hugtekur bæði ung sum gomul, tá ið hann syngur sínar kendu sangir.

Hanus hevur langt frá bara sungið Poul F. Hann hevur eisini tulkað aðrar føroyskar yrkjarar, og hann hevur eisini sungið sangir hjá útlendskum skaldum og tónasmiðjum. Hetta hevur hann gjørt til alskyns tiltøk, og á stórum popp- og rocktiltøkum hevur hann verið stórliga fagnaður.

Eingin tekur Hanus á einum palli, og tað verður prógvað ferð eftir ferð.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 5 |
| Ammassalik | 7 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 8 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 19 |
| London | 23 |
| Tromsø | 8 |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannah. | 23 |
| Helsinki | 16 |
| Moskva | 22 |
| Berlin | 24 |
| Warzawa | 26 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 25 |
| Madrid | 20 |
| Róm | 18 |
| Malorca | 21 |
| Athen | 28 |
| Malta | 27 |
| Tunis | 34 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 27 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 22 |
| New York | 26 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 23 |
| Meksikobýur | 17 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 22 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 989 hPa. norðan fyri Føroyar fer eystureftir. Ein veikur hátrýstryggur í útsynning úr Íslandi kemur hendavegin og mennist nakað.




**Í dag:**
Hátrýstið við Føroyar fer eystureftir. Lágtrýstið eystan fyri Hvarvið fer móti Íslandi og dýpist. Brúgvalagið haðani verður væntandi við Føroyar leygarkvøldið.

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 7/9 kl. 06⁰⁰– 8/9. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 8,2°
Minsti hiti máldur í sept.: - 0,5° - Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,4 mm – mált frá 7/9 kl. 06⁰⁰– 8/9 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í september: 15,8 mm

Sosialurin

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 1. september | Mánin longst frá jørðini |
| 3. september | Tendring |
| 11. september | Fyrra kvarter |
| 16. september | Mánin næstur jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 9. Sept | 11.02 | 23.24 | 10.02 | 22.24 | 10.17 | 22.39 | 00.47 | 13.02 | 01.47 | 14.02 | 09.17 | 21.39 | 08.17 | 20.39 | 11.17 | 23.39 | 00.02 | 12.17 | 10.47 | 23.09 | - | 12.02 |
| 10. Sept | 11.49 | - | 10.49 | 23.14 | 11.04 | 23.29 | 01.24 | 13.49 | 02.24 | 14.49 | 10.04 | 22.29 | 09.04 | 21.29 | - | 12.04 | 00.39 | 13.04 | 11.34 | 23.59 | 00.24 | 12.49 |
| 11. Sept | 00.14 | 12.56 | 11.56 | - | - | 12.11 | 02.14 | 14.56 | 03.14 | 15.56 | 11.11 | 23.53 | 10.11 | 22.53 | 00.29 | 13.11 | 01.29 | 14.11 | - | 12.41 | 01.14 | 13.56 |
| 12. sept | 01.38 | 14.20 | 00.38 | 13.20 | 00.53 | 13.35 | 03.38 | 16.20 | 04.38 | 17.20 | - | 12.35 | 11.35 | - | 01.53 | 14.35 | 02.53 | 15.35 | 01.23 | 14.05 | 02.38 | 15.20 |
| 13. sept | 03.03 | 15.31 | 02.03 | 14.31 | 02.18 | 14.46 | 05.03 | 17.31 | 06.03 | 18.31 | 01.18 | 13.46 | 00.18 | 12.46 | 03.18 | 15.46 | 04.18 | 16.46 | 02.48 | 15.16 | 04.03 | 16.31 |

5 707265 100050 >